

# Bjargaðu í evstu lø

**SJÓFRÁGREIÐING** Beint eftir at skiparin Ólavur Groth leyp í bjargingarbátin, sakk bátur hansara Annika millum Kanariuoyggjarnar. Einki svar fæst nakrantíð uppá, hví báturin sakk, tí hann liggur á 1200 til 1500 metra dýpi

Randi Jacobsen

Ólavur Groth var tungur í huga, tá ið hann fríggjadagin seinnapartin møtti at geva sína sjófrágreiðing um tilburðin, tá ið bátur hansara M/S Annika sakk millum Kanariuoyggjarnar 21. mars.

Báturin hevði ligið fyri veturin í býnum San Sebastian á oynni La Gomera. Fólk var alla tíðina umborð, og báturin hevði ikki likið nakað av týdningi.

Fyrrapartin 21. mars kom Marius Johannesen, vinmaður Ólav Groth við flogfari til Tenerifa, og Ólavur Groth fór at taka ímóti honum. Teir fóru síðan við ferjuni til San Sebastian og umborð á Anniku, sum teir skuldu sigla til havnabýin La Stinga á oynni El Hierro. Har skuldi báturin takast upp til eftirlit. Hann hevði avtalu við eina skipasmiðju um hetta.

Marius Johannesen skuldi hjálpa Ólavi Groth við arbeiðinum, sum teir væntaðu fór at taka eina viku.

Teir báðir fóru úr San Sebastian um fimm tíðina sama dag, og báðir søgdu tað sama í rættinum, at teir sigldu spakuliga, tí teir skuldu ikki vera frammi fyrr enn um morgunin.

Tey bæði árini, sum Ólavur Groth átti Anniku, legði hann stórt arbeiði í at umvæla bátin, men hann fekk eisini góða hjálp frá øðrum fólki í Føroyum. Báturin lá við Ljósá, og í fjør sigldu teir báðir bátin til Vestmanna, har báturin fekk neyðugu umvælingarnar. Tá ið hann fór haðani, riggaði alt, sum tað skuldi.

Annika fór so við fýra dreingjum avstað. Fyrst til Danmarkar, yvir gjøgnum Kielerveitina, niður til Spania og til Kanariuoyggjarnar. Seint í august komu teir til San Sebastian, og har lá báturin so fyri veturin. Dreingirnir fóru heimaftur.

## Gott veður

Aftur til dagin, tá ið Annika sakk.

– Vindurin var umleið 10 metur um sekundið, landnyrðingur, og tað skuldu verið góð siglingarlikindi, greiddi Ólavur Groth frá.

**SKIPARIN**

*Tað var tungt fyri skiparan Ólavur Groth at skula greiða frá hendingini, tá ið bátur hansara Annika sakk niðri við Kanariuoyggjarnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*